## FØÐINGAR

24. juni fingu Fríða og Bogi Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

25. juni fingu Emmely og Svend Erik Saxov, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4050 gr.

26. juni fingu Fríðbjørg og Árni Andreasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2920 gr.

26. juni fingu Tórunn Højgaard og Elmar Ósá, Roskilde, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4290 gr.

27. juni fingu Durita Isaksen og Magnus Emil Poulsen, Kvívík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4100 gr.

27. juni fingu Vanja Justinussen og Martin Gregersen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

28. juni fingu Berghild B. Skúvadal og Klæmint M. Petersen, Selatrað, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

28. juni fingu Mariann S. Kjærbo, Stykkið og Jóhan M. Stenberg, Argir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4000 gr.

28. juni fingu Otniel og Jonna Nygaard, Trongisvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3800 gr.

28. juni fingu Karin Kirke Petersen og Borgar Biskopstø, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4500 gr.

28. juni fingu Marita Müller og Niclas Jacobsen, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3825 gr.

28. juni fingu Joan Haraldsen og Gunnfríður Dahl-Olsen, Saksun, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4200 gr.

29. juni fingu Leila Petersen og Jóhan Hansen, Kambsdalur, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3050 gr.

29. juni fingu Nanna Johansen, Strendur og Magni Jacobsen, Hvalvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3650 gr.

29. juni fingu Anna Dalsgaard og Leif Klein, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

Marjun og Jógvan Pauli Joensen, Miðvágur, fingu ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

29. juni fingu Aimi og Helgi Justinussen, Argir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3800 gr.

30. juni fingu Susan Jacobsen, Klaksvík og David Hansen, Árnafjørður, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

1. juli fingu Charlotte Højborg og Jákup Martin Sørensen, Húsavík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3650 gr.

1. juli fingu Beinta Tórolvsdóttir og Torkil Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

2. juli fingu Dagny Holmsen og Herman Jespersen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

2. juli fingu Harda Jacobsen og Tórur Andreasen, Strendur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4250 gr.

3. juli fingu Berlys og Tórhallur Niclasen, Søldarfirði, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3550 gr.

3. juli fingu Byrgerð og Sverri Kjærbæk, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3425 gr.

4. juli fingu Esther Dahl Jacobsen og Jantórur E. Joensen, Skála, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4650 gr.

4. juli fingu Laila av Reyni og Gøran Wennerström, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

5. juli fingu Ebba Mortensen og Dánjal Højgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4000 gr.

## TILTØK

**Gudstænastur**
**6. sunnud. e. Trinitatis**
*Kunoy:* kl. 12, Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* Klaksvík, kl. 11 Hans Eiler Hammer (norskir skótar luttaka)
*Tvøroyri:* kl. 11,
*Øravík:* kl. 12.15, Jónsvein Bech. (Talvan gongur í báðum støðum fyri Hina Føroysku Sjómansmissiónina)
*Skálafirði:* kl. 11,
*Oyndarfjørður:* kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
*Funningur:* kl. 12, messa, Emil Olsen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Henning Nielsen. (Talvan gongur fyri føroysku Heimamissiónina)
*Kaldbak:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Bøur:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, Bergur D. Joensen
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Fuglafjarða kirkja:* kl. 11 Hans Jacob Joensen, biskupur

**Meinigheitin í Hoyvík**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 gudstænasta við Monu og John. Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Rhema á Hálsi**
Sunnudagin kl. 11 Møti við Mervin Gunaselvam av Sri Lanka. (Ongin sunnudagsskúli vegna summarfrí). Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Einki møti um kvøldið í summarfrítíðini. Heimasíðan: www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, har tey ungu luttaka við vitnisburði og sangi.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting. Sunnudagsskúlin er í summarfrí. Kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 Kvøldmøti v/ Liljan Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Vestmanna**
Heimamissiónin hevur útimøti í Vestmanna leygarkvøldið kl. 20.00.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Maibritt Fredeiksberg.
Sunnudagin kl. 19 Møti við Mervin frá Shri Lanka.
Vælkomin í kelduna: www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti við Súna og Sylverius.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Palla Højgaard og kl. 17 Evengel. møtirøð við sangi og vitnisburði.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið frá kl. 22 er opið hús í Thabor. Millum annað verður kór, sangur, vitnisburður og suppa.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Margeir Toftegaard og kl. 21 er ungdómsmøti við Christian Joensen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld verður lovsongsmøti hjá Hedvig og Hallmar.
Sunnudagin verður útimøti kl. 17, um viðrar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Terja og Mourits. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18 Møti við Katrinu Bærendsen og Ragnari Ludvig.

**Dagtilhaldið Føvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 17. august hava vit opið frá kl. 13-17. Á ólavsøku verða framsýningar í Tilhaldinum. Á miðhæddini er ein fólkalívsmyndaframsýning og í kjallaranum ein hugleiðing í litum av kirkjubøstólunum. Opið verður 28., 29. og 30. juli kl. 16-20. Somuleiðis verður møguleiki at keypa sær ein drekkamunn við ábiti.**

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 7. juli verður útferð til Úttriðingshaga í Vágum. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 8.00. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Túrurin er langur og tungur og gingið verður í støðum í brattlendi.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 17.00 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

## ANDLÁT

**27. juni**
Anna Vilhelmsen, Klaksvík, ættað av Syðradali á Kalsoynni, 74 ár.

**28. juni**
Sigga Maria Thomasen, Sørvágur, 89 ár.
Kristina Poulsen, vanliga nevnd Dadan, Tvøroyri, 80 ár.

**29. juni**
Johnreed Fuglø, ættaður av Viðareiði, 59 ár.

**30. juni**
Helena Vilhelm, fødd Djurhuus, ættað av Nesi við Vág, 82 ár.

**01. juli**
Jóhanna Sofía Thomsen, vanliga nevnd Hannefía, Hoydalar, 89 ár.
Louisa Hansen, Klaksvík, ættað úr Mikladali, 87 ár.
Jóhanna Sofía Thomsen, vanliga nevnd Hannefía, Hoydalar, 89 ár.

**02. juli**
Lena Poulsen, ættað úr Kollafirði, búsitandi í Hvannasundi, 75 ár.
Sámal Funding Seth Johannesen, ættaður úr Funningi, búsitandi í Øsby Haderslev, 57 ár.

**03. juli**
Oluf Olsen, Toftalíð, Vágur, 92 ár.
Esther Holm Beck, ættað úr Havn, búsitandi í Strandby, 71 ár.



## TILTØK

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo
**Skrivstovan er stongd til 7. august 2002.**

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo
**Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá mánadegi 8.7.02 til mikudagin 31.7.02.**

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post: sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til umboð í starvsnevndini fyri økisnevndunum, ið síggjast á heimasíðuni, www.javni.fo
Fax: 310557 · Teldupostur: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

## 95 ÁR

Súsanna Hansen á Argjum verður 95 ár mánadagin 8. juli. Hon er burturstødd.

## PRÓGV

Barbara Berg hevur tikið prógv sum sosialráðgevi á Den Sosiale Højskole í Keypmannahavn.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 6. juli: Leif Mosekilde, tlf. 447010
Sunnudagin 7. juli: Knud Jakobsen, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Við Guds ríki er tað soleiðis vorðið, sum tá ið ein maður hevur lagt sáð í jørðina!*

*Mark. 4,26*

Hesi orðini siga, at tað er við Guds ríki sum við einum sáði, ið verður lagt í jørðina. Og tað vil siga, at kristindómurin og trúarlívið eru Guds gávur til okkara. Tað er ikki nakað, vit kunnu skapa og framleiða. Sáðið veksur og ber ávøkst. Hetta hendir av sær sjálvum.

Vit vórðu gróðursett á hinum sanna víntrænum í okkara heilagu dópsstund. Nú skal hin doypti vaksa í trúgv og kærleika. Og vøksturin fer fram alt lívið. Sum arbeiðsmenn í Guds víngarði, í kirkjuni mega vit geva tol. Vøkstur tekur tíð.

Vit liva sum kristin í felagsskapi, vit liva ikki sum einstaklingar. Og tí eiga kærleiki og umsorgan at verða eyðkenni fyri okkum. Gud byrjaði við okkum; men skulu vit bera ávøkst, er avgerandi, at vit kenna okkara pláss í kristna felagsskapinum. Vit kalla henda kristna felagsskap kirkjan. Vøkstur í trúgv og kærleika kemur av at hoyra. Vit hoyra okkum fram til trúnna og kærleikan. Og tað er orðið, gleðiboðskapin, vit hoyra.

Hann virkar hetta bæði í og við orði og sakramentum. Øll sonn umvending leiðir hin umvenda inn í hin kristna felagsskapin. Leiðir umvendingin okkum ikki inn í kirkjuna, soleiðis at vit kenna okkum heima har, er ivasamt, um talan er um kristna umvending. Sonn umvending skilir okkum ikki frá kirkjuni. Ger hon tað, hava vit bygt hana á kenslur, sum eru komandi og farandi. Vit hava bygt á kyksendi!

Amen.

**David Johannesen**

## BRÚDLEYP

Mikudagin 3. juli *giftust* í Havn Áshild Poulsen, Tórshavn og Dan Joensen, Argir.

Í dag kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Jónhild Hansen, Nes og Bent Djurhuus, Strendur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

Í dag kl. 18.00 giftast í Sandavágs kirkju Jana Skoradal, Sandavágur og Jákup Henriksen, Miðvágur. Borðhaldið verður í høllini á Giljanesi kl. 19.30.

Í dag, leygardagin kl. 10.00 giftast í Vesturkirkjuni Andrea Heindriksdóttir og Ragnar A. Jacbsen. Aftaná vígsluna verður móttøka í Havnar Klubba.

Í dag, leygardagin giftast í Dómkirkjuni Aina Leitisstein Knudsen og Magni Olsen, bæði úr Tórshavn. Veitsla verður fyri innbodnum í Sjónleikarhúsinum.

Fríggjadagin 12. juli giftast í Vestmanna kirkju Maibritt Andris, Hjørring og Jógvan Christiansen, Vestmanna. Tey, ið vilja ynskja brúðarparinum tillukku, eru vælkomin í heimið hjá foreldrunum Margaret og Finnboga í Vestmanna.

Leygardagin 13. juli kl. 13.00 giftast í Vestmanna kirkju Sussi Anette Flores Kristensen og Jóhannus á Rógvu, Vestmanna og Katrin á Rógvu og Dion Egge Hansen, Slangerup. Veitslan verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarpørini við at koma, kunnu ringja á tlf. 424151, 211851 ella 424308 áðrenn mánadagin 8. juli.

Sunnudagin 14. juli kl. 13.30 giftast í Býráðssalinum í Havn Jónhild Æðustein Poulsen, Tórshavn og Ruben Maarbjerg Busk, Sabro. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Hotel Hafnia. Opið hús verður 15. juli, Undir Gráasteini 64, aftaná kl. 15.00.

Fríggjadagin 19. juli giftast í Gøtu kirkju Heidi Jacobsen, Syðrugøta og Jan Heinesen, Norðragøta. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja vera við til at hátíðarhalda henda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. 441627 ella 441512.

Leygardagin 20. juli kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum, Klara í Túni, Toftir og John Jakobsen, Saltangará. Veitsla verður fyri innbodnum í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum kl. 18.30.

Leygardagin 20. juli kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Marianna Birgitta Jacobsen, Tórshavn og Finn Hansen, Nólsoy. Veitslan verður í B36 húsinum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 20. juli kl. 16.00 giftast í Haldórsvíkar kirkju Linda Hansen, Haldórsvík og Johan Birgir Dahl-Olsen, Saksun. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja vera við til at hátíðarhalda henda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá innan 10. juli á tlf. 423495, 222154 ella 423390.

Leygardagin 20. juli kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Kristina Nónklett Jacobsen, Glyvrar og Jógvan Martin Hansen, Strendur. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 18.30, kunnu ringja tlf. 224088 ella 448355 í seinasta lagi 7. juli.

Leygardagin 27. juli kl. 10.00 giftast í Vágs kirkju Rakul Nolsøe og Michael Berg í Lágabø, Vágur. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin til morgunmatar í VB-húsinum eftir vígsluna og ikki sum áður lýst, á Hotel Bakkanum.

Leygardagin 27. juli kl. 15.00 giftast í Dómkirkjuni í Tórshavn Ann Joan Nicolajsen, Skopun og Magni Reinert, Hoyvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at ringja á tlf. 312962, 421531 ella 258761 í seinasta lagi 8. juli.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Maibritt Johannesen og Andrass Ásbjørnsson Midjord, bæði av Argjum. Døgurði verður fyri innbodnum. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 20.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma í veitsluna, verða biðin um at siga frá áðrenn 12. juli á tlf. 310039.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Arnleyð Krosslá og Hans Jacob W. Hjelm, Vágur. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at vera við at gleða brúðarparið kunnu ringja á tlf. 373357, 373207 ella 373094 áðrenn 15. juli.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Jona í Lon (Jacobsen), Klaksvík og Eystan Joensen, Leirvík. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 457588, 217588 ella 262383 innan 20. juli.

Leygardagin 10. august kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Hallur Knudsen, Saltangará og Ragnhild Jensen, Sandur. Veitslan verður í B68-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. juli á tlf. 448655.

Leygardagin 17. august kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Sólheim, Saltangará og Egon Joensen, Sandavágur. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 322321 ella 264838 í seinasta lagi 26. juli.

## DIAMANTBRÚDLEYP

Í dag, 6. juli hava hjúnini Edith og Jógvan Johannesen, Lamba, diamantbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá diamantbrúðarparið, eru vælkomin í kappróðrarneysti hjá NSÍ á Glyvrum sama dagin millum kl. 9.00-14.00.